Formansfrágreiðing 2007

Inngangur

2006 var eitt serligt ár hjá MBF, við nógvum stórum tiltøkum á skránni. Orsøkin var, at MBF hátíðarhelt at 25 ár vóru liðin síðan meginfelagið varð stovnað.

Eitt tílíkt merkisár gav okkum høvi at gerast enn meiri sjónlig og at seta á skrá serlig tiltøk. Eitt merkisár gevur eisini høvi at líta aftur á tað sum farið er, samstundis sum at einamest eigur at lítast frameftir. Við hesum í huga settu vit yvirskrift yvir árið, "Brek í søgu og framtíð". Við hesari yvirskriftini valdi starvsnevndin at leggja árliga føðingardagsvirksemið eftir.

Av og á er umráðandi at hyggja at tí sum farið er, fyri at vita hvussu langt er komið, tí skjótt er at siga at onki er hent, ella fyri at fáa staðfest hvar vit eru á leið, og um kósin skal setast øðrvísi. Tað var umráðandi fyri okkum, at tiltøkini sum vit skipaðu fyri, vóru tiltøk sum vit í framtíðini kundu fáa gagn av, tiltøk sum kundu geva borgaranum við breki nakað ítøkilig. Tey tiltøk vit skipaðu fyri, bæði við útgávum av bóklingum, ráðstevnu og hátíðarhaldi, fingu góða umrøðu í miðlunum, sum tískil varpaðu ljós á arbeiðið , sum MBF virkar fyri.
Í virkisfrágreiðingini liggja frágreiðingarnar frá tiltøkunum í samband við 25 ára haldið.

MBF roynir áhaldandi at arbeiða fyri, at vit kunna gerast so sjónlig sum møguligt, og at tey mál, sum vit arbeiða fram ímóti, kunnu setast á politiska dagsskrá. Tað er sera umráðandi, at vit fáa pláss í ymiskum ráðum og nevndum sum verða sett, so at vit kunnu fáa ávirkan á avgerðir, sum verða tiknar, og at vit kunna arbeiða fyri, at hugburðsbroytingar henda í samfelagnum. MBF skal virka fyri, at brekaðmál koma við sum ein natúrligur partur av allari samfelagstilrættalegging

Tá ið Føroya Landsstýri setti sær fyri at seta eina visjónsætlan út í kortið, og bólkar vóru settir í Visjónstorgið, tá fegnaðust vit um, at MBF fekk sítt pláss á hesum torginum.
Líka mikið hvørja politiska hugsan mann hevur um hesa ætlanina, so hevur hetta verið eitt gott høvi hjá MBF at víst á okkara mál.

Endamálið hevur verið at gera nakrar greiðar og framsóknar ætlanir fyri Føroyar og er tað at fegnast um, tí at leggja framtíðarætlanir nógv ár fram í tíðina hevur sum heild ikki verið siðvenja í Føroyum, og enn minni á brekaðøkinum. Føroyskur politikkur hevur í alt ov stóran mun verið kendur fyri "eldsløkkjarí".

Visjónsarbeiðið,ið MBF hevur verið partur av, hevur verið skipað við einum breiðum skara av fólki, frá fakfeløgum, stovnum, aðalráðum til áhugabólkar m.a. MBF. At fáa høvi at seta orð á ætlanir fyri framtíðina, sum politiski myndugleikin skal seta í verk komandi árini, er ikki nakað sum býðst á hvørjum degi. At ein so stór breidd av fólki, ið umboða so nógv ymisk økir, sita og tosa um felagsáhugamál og seta orð á ætlanir fyri framtíðina ger, at málini verða nógv breiðari lýst og at orðingin av framtíðarpoltikki verður meira fjøllbroytt í mun til ymiskleikarnar í samfelagnum sum heild, eisini fólk við breki.

Sjálv tilgongdin í visjónsarbeiðinum hevur eisini verið við til at fremja og menna eitt samstarv millum bólkarnar sum m.a. hevur økt um vitanarstøðið og harvið viðvirkað til, at mørk verða flutt.

Eg trúgvi, at vit við hesum samstarvinum kunnu vera við til at broyta hugburð á nógvum økjum. Tilfarið kann bara um vit brúka tað rætt, verða ein kelda til íblástur um, hvat feløg og politiski myndugleiki ynskja skal henda í framtíðini. Strategipappírini liggja tøk, so ikki skuldi verið neyðugt at sett bólkar at gera arbeiðið umaftur í framtíðini,

Rættindi er ikki ein sjálvfylgja hjá fólki við breki, tey hava altíð verið noydd at bíða eftir, nær ið politikarar hava hildið tað verið uppá sítt pláss at seta tiltøk og skipanir í verk. Vit hava verið noydd at dúva uppá, hvørjar ætlanir politiskir myndugleikar hava havt á brekaðøkinum. Tað hevur so fört við sær, at oftani gongur sera seint á brekaðøkinum.

Men nú eru onnur framtíðarútlit at hóma. Nýggi sáttmálin, sum ST samtykti beint fyri jól, fer at tryggja fólki við breki javnstøðu og størri rættindi. Tað er eisini fyrstu ferð, at fólk við breki fáa ein sáttmála, sum umfatar so grundleggjandi rættindi og javnstøðu, sum eitt nú borgarlig og politisk rættindi og sosial, økonomisk og mentunarlig rættindi.
Fólk við breki hava ongantíð havt rættindasáttmála ella verið umfatað av líknandi sáttmála, sum hevur givið so ítøkilig rættindi.

ST sáttmálin áleggur statunum, at skipa lógarverkið soleiðis, at fólk við breki fáa javnstøðu, og at virka fyri at fólk fáa somu rættindi á øllum økjum. Eisini skal lógarverkið sum er galdandi í dag, kannast og broytast, so at tað lýkur krøvini, sum sáttmálin ásetur.
Hesin sáttmálin er eisini søguligur í øðrum høpi, tí tað bert tók 5 ár at gera henda sáttmálan, har aðrir sáttmálar hava tikið tvífalt so langa tíð, og tað sigur mær, at fólk hava veruliga sæð hvussu neyðugur hann er, og hava arbeitt dúgliga fyri at koma á mál.

Hetta er nakað við kunnu fegnast um í framtíðini, og tí skal áhaldandi virkast frá MBF fyri at fáa henda sáttmálan settan í gildi í Føroyum. Vit hava sent løgmanni áheitan um at arbeiða fyri at seta sáttmálan í gildi í Føroyum, og at fáa sett ein arbeiðsbólk sum kann gera tað fyrireikandi arbeiðið sum krevst, fyri at ein tílíkur sáttmáli kann verða staðfestur av Føroya Løgtingi.

Tað er fyri at bøta um livikorini hjá borgaranum við breki MBF skal arbeiða fyri. Men tá vit skulu arbeiða fyri at bøta um livikorini hjá ymsum samfelagsbólkum, sum vit umboða, er neyðugt við vitan á økinum, sum er kannað, og sum kann prógvast.

MBF setti sær fyri at kanna livikorini hjá fyritíðarpensjónistum í Føroyum. Kanningin sum Granskingardepilin í Klaksvík hevur staðið fyri, hevur verið leingi ávegis, men er nú loksins komin til gjøgnumlestur og viðmerkingar hjá MBF.

Niðurstøðan er sera greið. Ein stórur bólkur av fyritíðarpensjónistunum í Føroyum hava ikki tað lív, sum er virðiligt í einum framkomnum landi sum Føroyum. Sum felagsskapur mugu vit krevja, at fólk við breki, sum eru noydd av fara av arbeiðsmarknaðinum, fáa eina fyritíðarpensjón sum er á einum støði, har tey ikki skulu verða noydd at liva av sínum nærmastu. Eisini eiga tiltøk at verða sett í verk, so at fólk ikki føla seg útihýstan úr samfelagnum. Tey kenna seg sum ein ósjónligan og gloymdan bólk. Hetta er ein samfelagsbólkur, sum livir í útjaðaranum av samfelagnum, skilt á tann hátt, at fá ella ongin gevur sær far um hesi fólk, fleiri teirra siga, at teirra samleiki er burtur.

Fíggjarligt frælsi hava tey ikki, og eru oftani bundin at familju og øðrum fyri at klára seg. Møguleikin at brúka sín restarbeiðsførleika er ikki til staðar, ei heldur møguleikin at uppkvalifisera sín restarbeiðsførleika.

Fyritíðarpensjónistar eru millum tey lægst løntu í Føroyum, og fáa langt undir eina arbeiðsmannaløn í pensjón. Tey hava ring ráð til tað, sum annars eitt vælferðarsamfelag bjóðar sínum borgarum, eitt nú bústaðarmøguleikar sum eru góðir, sosial og mentunarlig tilboð. Kanningin gevur veruliga politikarum nakað at hugsa um, og MBF hevur við hesi kanningini eitt gott arbeiðsamboð og eitt vældokumenterað skjal. Tað er á hesum støðinum vit vildu hildið fram at arbeitt .Gjørt dygdargóðar kanningar og verkætlanir, og til tað krevst peningur.

Er tað so nakað sum eg sum formaður má staðfesta ikki eydnaðist, og sum eg áhaldandi má arbeiða fram ímóti, so er tað at fáa hægri játtan til MBF og limafeløgini. Tað er trupult at koma ígjøgnum hjá politiska myndugleikanum við, at okkum tørvar eina hægri játtan fyri at kunna gera eitt dygdargott arbeiði. Eg vísti á trupulleikan í fjør, fyrst í míni formansfrágreiðing, síðani á fundi við Landsstýrismannin í heilsumálum, síðani samrøðu sjálvan føðingardagin í ÚF, og so í leiðaranum í MBF blaðnum, og at enda í míni røðu á Hotel Føroyum har allir landsstýrismennirnir vóru umboðaðir, uttan at tað eydnaðist.
Vit hava enn einaferð sent umbøn til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum, og til limirnar í fíggjarnevndini um at hækka játtanina, og vónandi kunnu vit øll royna at ávirka, har vit eru í kontakt við politikarar.

Vit fáa føgur orð á vegnum frá ymsum myndugleikum og politikarum, men tað er ikki nokk. Skal okkara arbeiði gerast dygdargott, skal hægri játtan til. Mín vón er, at politikarar á Føroya Løgtingi meina tað teir siga, og vísa tað í verki í komandi fíggjarlóg fyri 2008.
Við vón um eitt gott og virkið ár, har Løgtingsval er fyri framman, fara vit í MBF at virka fyri at mál sum vit arbeiða við, kunnu koma á politiska dagsskrá.

Leila Solmunde, formaður

Virkisárið 2006/2007

Sosialpolitiska økið.

Íbúðarviðurskiftir.

Bústaðarmøguleikar. Tað er ein sannroynd, at møguleikin hjá fólki við serligum tørvi at fáa til vega hóskandi bústað er ógvuliga trupul í dag, ja stórt sæð ómøguligur, orsakað vantandi tilboð og høga kostnaðarstøðið, ið er ógjørligt hjá fólki, ið ikki hava orku ella førleikan at átaka sær fulltíðarstarv, ella sum bert hava fyritíðarpensjónina at dúva uppá.

Í 2005 skrivaði MBF eitt álit um hendan trupulleika og sendi tað til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum. Arbeitt hevur síðan verið við hendan trupulleika, og eitt lógaruppskot er nú á veg í tingið um lutaíbúðir og uppskot um lánimøguleikar fyri fólk við serligum tørvi. Væntandi fær MBF lógaruppskotið til hoyringar ein av fyrstu døgunum.

Bústaðarbroytingar og stuðul til avlamisbilar. Í juni 2006 varð MBF gjørt vart við, at kærunevndin í einum úrskurði 21.03.06, hevði staðfest, at heimildin fyri stuðul til íbúðarbroytingar og stuðul til avlamisbilar var ógvuliga ivasom og vísti kærunevndin á, at ein lógarbroyting varð neyðug. Hettar viðførdi, at øll málsviðgerð, hesum viðvíkjandi, varð steðgað alt fyri eitt, og var hetta ein ótolandi støða fyri tey, sum tað rakti. MBF heitti tí á AHR um at finna eina bráðfeingisloysn á hesum trupulleikanum, samstundis sum ein varandi loysn varð funnin við eini lógarbroyting.

30 november legði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum fram uppskot um at broyta §18 b og c í forsorgarlógini, so at heimildin fyri at veita stuðul til avlamisbilar og íbúðarbroytingar kundi staðfestast. 15. februar 2007 varð uppskotið samtykt.

Fyritíðarpensiónir

Í samband við at Finnur Helmsdal legði fram uppskot til samtyktar um at avtaka lægstu fyritíðarpensión, ella at lægsta fyritíðarpensjón í krónum og oyrum svarar til miðalpensión, varð MBF innkallað til fund í Trivnaðarnevndini.

Á fundinum vísti MBF á, at sum útgangsstøði skulu fólk við breki bjóðast møguleika á arbeiðsmarknaðinum longst møguligt. Samstundis varð víst á, at lægsta fyritíðarpensjón eigur at verða tikin av, og at vit bert hava 2 pensjónsstig, - miðal og hægstu pensjón. Ein møguleiki kundi eisini verði bert at hava 1 pensiónstig, umframt kompensasjón fyri brekið, ið so verður upphæddin, ið ger munin á pensiónsupphæddini.

Dentur varð lagdur á at tryggjast skal fyritíðarpensjónistum eina inntøku, ið gevur møguleika fyri einum sjálvstøðugum og innihaldsríkum lívi. Orka eigur eisini at verða løgd í at styrkja møguleikan at gagnnýta restaarbeiðsførleikan, umframt at upphæddin, ið møgulig er at vinna við síðuna av, eigur at hækkast.

Stuðulsfólkaskipanin

Í 2004 varð kunngerðin um stuðulsfólkaskipanina samtykt. Endamálið við skipanini er at veita stuðul, eftiransni, umsorgan og sosialpædagogiska hjálp til fólk við breki fyri at møguleiki kann gerast fyri einum sjálvstøðugum og virknum lívi. Trupulleikin hevur tó verið at skipanin bert hevur verið galdandi fyri persónar millum 16 og 66 ár t.v.s, at tá ið persónurin gjørdist 67 ár misti hann henda møguleikan at varðveita hetta tilboð.

MBF hevur saman við Ráðnum fyri brekað fleiri ferðir víst almenna myndugleikan á hendan trupulleikan. Í okkara grundgevingum hava vit víst á, at stuðulin í hesum føri er at rokna sum eitt hjálpartól, og tað missir ein ikki um ein gerst 67 ár. Hesin trupulleikin er nú loystur við kunngerðarbroytingini nr. 116 frá 19.12.2006. Hetta inniber, at fólk nú kunnu varðveita sín stuðul eftir at tey eru fylt 67 ár. Treytin er, at tey hava havt stuðulin áðrenn 67 ár, og at stuðulin verður brúktur til at gera lívið meira virkið.

Bóklingur

Í samband við 25 ára haldið hjá MBF og tí at stórur tørvur í fleiri ár hevur verið á at endurnýggja bóklingin "Til heim við brekaðum børnum", ið MBF gav út í samband við 10 ára haldið hjá MBF, avgjørdi MBF loksins at geva bóklingin út av nýggjum. Av tí at stórar broytingar eru hendar á økinum var bóklingurin frá 1991 als ikki tíðarhóskandi.

Stórur tørvur er hjá foreldrum at barni við breki at verða kunnaði um, hvørjir møguleikar eru fyri at fáa hjálp og fyri at fáa at vita, hvar tey kunnu venda sær fyri at fáa fatur á hjálpini. Ein bólkur varð tí settur at standa fyri nýggju útgávuni. Í bólkinum hava sitið Eyðvør Mortensen, samskipari umframt Doris Hansen, Oyvindur av Skarði og Lea Wolles. Bóklingurin " Leiðbeining um hjálp og stuðul til foreldur at barni við breki" er nú liðugur og kom út á Altjóða degnum teirra brekaðu 3. desember. Stuðlað útgávuni fíggjarliga hava "Vælskapt brek", Skótahjálpin og Happadráttargrunnurin.

Arbeiðsmarknaðarpolitiska økið

Rúmligi arbeiðsmarknaðurin

Arbeiðið hjá MBF at virka fyri einum rúmligari arbeiðsmarknaði, hevur í farna ári í mestan mun verið saman við Ráðnum fyri Brekað. Endamálið hjá okkum er, saman við Ráðnum at virka soleiðis, at vit fáa styrkt um tann innsatsin sum verður gjørdur, so at tað eru fleiri sum taka ábyrgd á økinum.

Við støði í hesari ætlan, byrjaðu vit eina fundarrød við fakfeløgini. Fundir hava verið við Føroya arbeiðarafelag, Vinnuhúsið og ætlanin er at hava fund við Starvsmannfelagið eisini.
Endamálið við fundunum er at varpa ljós á rúmliga arbeiðsmarknaðin, og er tíðarskeiðið kanska ongantíð so gott sum nú ið arbeiðsloysið í landinum er næstan onki. Tað er umráðandi, at vit fáa ein góðan dialog við arbeiðsfeløgini, og hava vit m.a tosað um, at álitismannaskipanirnar kundu verið styrktar soleiðis, at fólk sum fáa skaða ella brek, kunnu hava ein at venda sær til, áðrenn hann dettur út úr arbeiðsmaknaðinum. Eisini hava vit tosað um teir møguleikar, sum kunnu verða í at umskipa

arbeiðsuppgávurnar, so fólk kunnu fáa lættari ella fáa okkurt heilt annað tilboð, um viðkomandi gerst sjúkur. Tilknýtið til arbeiðsmarknaðin er umráðandi at halda fast í, og aðrar loysnir eiga at verða royndar, áðrenn fólk fara úr sínum arbeiði.

Strategibólkurin sum arbeiddi við Arbeiðsmarknaðarmálum gjørdi eitt strategipappír, sum kanska kann metast at verða søguligt. Allir partar á arbeiðsmarknaðinum vóru umboðaðir í bólkinum, sum kom við einum góðari ætlan, og um vit byggja uppá teirra ynskir um rúmligan arbeiðsmarknað, kunnu góðar skipanir koma burturúr.

MBF eigur at orða sín politikk á økinum, sum kann stimbra uppundir, at hugburðurin broytist, so at arbeiðsgevara síggja tað tilfeingi og tað fjølbroytni sum er í øllum borgarum. Eisini eiga vit at virka fyri, at politiski myndugleikin setur rúmligan arbeiðsmarknað á dagsskrá, so at skipanir og møguleikin at útbúgva seg gerast betur.

Útbúgvingarøkið

Fólkaskúlin

Í fleiri ár hevur verið sera stór ónøgd við serundirvísingina í fólkaskúlanum. Ein av trupulleikunum hevur verið at ov fáir tímar hava verið settir av til hetta endamál og eisini at ov fáir lærarir við serútbúgving hava fingið álagt hesa uppgávu. Tað er sernámsdepilin, ið umsitur hesar tímar. Tað er ein sannroynd at tímatalið til serundirvísingina javnt er lækka seinastu árini m.a. av tí at tímarnir til persónligan/praktiskan stuðul í skúlunum, hava verið tikið av serundirvísingartímunum, umframt at stuðul til atferðartrupul børn krevur nógvar stuðulstímar.

Ein av trupulleikunum hevur verið hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av stuðlunum í skúlatíðini. Higartil hevur tað verið almannastovan, ið hevur goldið fyri stuðlarnar, men at ábyrgdarbýtið er býtt millum tveir myndugleikar, nevniliga MMR og AHR, hevur givið nógvar trupulleikar tá ábyrgdin skal plaserast í mun til avgerðarrættin, setanarviðurskiftir og menning av starvsfólkunum. Trupulleikin stendst eisini av, at trupult kann vera at skilja ímillum, nær tað er ein persónligur stuðul, og nær tað er ein pædagogiskur stuðul, og harvið hvør myndugleiki skal gjalda hvat.

MBF er av tí áskoðan at sektorábyrgdin eigur at virka í hesum føri, t.v.s at Mentamálaráðið sum varðar av øllum sum viðvíkur fólkaskúlanum eisini fult út skal varða av skúlanum, tá umræður børn við breki. Tí vendi MBF sær til avvarandi myndugleika um hendan trupulleikan við áheitan um at finna eina loysn.

AHR og MMR komu síðan ásamt um, at MMR skuldi átaka sær hesa ábyrgd, og søktu teir tí um eykajáttan fyri at nøkta tørvin á stuðulstímum. Fíggjarnevndin góðtók tó ikki hesa loysn, og tí varð trupulleikin framvegis ikki loystur. Løgmaður setti síðan ein arbeiðsbólk við umboðan úr MMR, AHR og løgmansskrivstovuni at lýsa spurningin um ábyrgdarbýtið viðvíkjandi stuðlum til børn við serligum tørvi í skúlatíðini. MBF, saman við viðkomandi fakfeløgum, vóru sett sum hoyringspartnarir. Niðurstøðan í álitinum hevur so fört við sær, at MMR nú hevur endaligu ábyrgdina av stuðlum í skúlatíðini, og fíggjarjáttanin til stuðlar varð hækkað á fíggjarlógini við knøppum 6 mill. kr.

Nú játtanin er hækkað, er tað okkara vón at hetta fer at ávirka serundirvísingina soleiðis, at dygdin á serundirvísingin framyvir fer fram á einum nøktandi støði. Her fer MBF at heita á foreldur, ið varða av børnum við serligum tørvi um at fylgja væl við og siga okkum frá, hvønn veg tað ber. MBF hevur umhugsað møguliga at gera eina kanning av skúlaviðurskiftunum hjá børnum við serligum tørvi.

Atkoma til skúlar

Í samband við at MBF kannaði atkomuviðurskiftini av almennum og kommunalum bygningum, vóru skúlarnir eisini kannaðir. Niðurstøðan av kanningini er at støðan er vánalig, tí skúlarnir eru í nógvum førum ikki serliga væl egnaðir fyri røslutarnað. Av 37 skúlum sum vit vitjaðu, eru bert 8 atkomuligir.

Tó skal leggjast afturat, at fleiri av føroysku skúlunum eru gamlir, og tað eru fleiri kommunur, sum byggja nýggjar skúlar, so her eru broytingar á veg. Somuleiðis hava vit frætt frá nøkrum skúlum, sum siga at tey hava gjørt broytingar síðani vit vitjaðu. Tað má sigast, at tað eydnaðist væl við vitjanini, tí mann sær at broytingar henda á atkomuøkinum.

Heilsupolitikkur

Rehabilitering

Tað er ein sannroynd at rehabiliteringin hevur verið eitt forsømt øki í Føroyum. Nógv av limafeløgunum hava víst á trupulleikar um vantandi viðgerðartilboð, vantandi samskipan og vantandi heildartilboð.

Orsakað vánaligu viðurskiftini í Føroyum, tá umræður rehabilitering og í samband við 25 ára haldið hjá MBF, skipaði MBF í mai fyri einari ráðstevnu um rehabilitering við luttøku av fyrilestrahaldarum úr Norra, Danmark og Føroyum. Ráðstevnan eydnaðist sera væl, umleið 220 fólk luttóku.

Kanning um tørvinum á rehabilitering hjá limafeløgunum

Í samband við arbeiðið í rehabiliteringsbólkinum, ið landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum setti, hevur MBF gjørt eina kanning millum limafeløgini í MBF um tørvin hjá hvørjum felag sær á rehabilitering. Samanumtikið vísti kanningin at tørvur var á:

- Møguleikanum fyri ókeypis viðlíkahaldsviðgerð í nærumhvørvinum, - í heiminum, - á privatum fysioterapistovum, á fysioterapistovum á ellis- og røktarheimum og møguleikar skulu vera fyri at nýta hyljarnar á skúlum og røktarheimum. Hyljarnir skulu vera serliga heitir og møguleiki skal vera fyri serkøna vegleiðing og stuðul.

- Skipað áhaldandi taluundirvísing eigur at vera runt um í landinum. Umhugsast má, hvussu og undir hvørjum myndugleika henda undirvísing verður skipað fyri at tryggja støði og fyri at hetta tilboð stendur í boði alt árið.

- Intensivari holdvenjing t.d. á Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi, t.d. Apopleksi, Morbus Bechterew, Liðagikt, Sclerose og onnur.

- Í serligum føri skal møguleiki vera fyri at fara uttanlands á stovnar við serkunnleika.

- Heildartilboð, tí ein afturvendandi trupulleiki er vantandi stýring og samskipan á rehabiliteringsøkinum. Umráðandi er tí, at tað verður bygt upp **eitt stað,** har borgarin kann venda sær.

- Fakkunnleika, ið virkar á einum høgum, serkønum fakligum støði.

- "Videnscentur" innan tey ymsu økini, serliga við atliti til føroysk viðurskiftir

- Skúling við málrættaðari kunning og við skúlatilboði fyri at menna tann einstaka í mun til sítt brek

- Sjálvhjálparbólkar av ymsum slag

Arbeiðsbólkur viðvíkjandi rehabilitering

Í oktober 2006 setti landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ein arbeiðsbólk at gera eina rehabiliteringsætlan fyri Føroyar. Í bólkinum sita umboð fyri sjúkrahús, røktarheim, heimarøkt, almannastovuna, kommunulæknar, fyrioterapeutarnar, ergoterapeutarnar og MBF. Marjun Poulsen, hevur verið sett í starv sum samskipari og skrivari. Tilmælið skal byggja á úrslitið av arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt tørvin á rehabilitering hjá ávísum sjúklingabólkum, m.a. apopleksisjúklingum, giktasjúklingum, spastikarum og øðrum sjúklingabólkum. Tilmælið skal eisini taka støði í, at Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahús verða miðdeplar. Tað skal viðmerkjast at omanfyrinevnda kanning hjá MBF eisini hevur verið ein týðandi partur í arbeiðinum

Nógvir fundir hava verið og hevur tað víst seg, at hettar er eitt sera trupult og umfatandi arbeiði. Fyri at avmarka okkum, eru vit komin fram til í fyrsta umfari at gera eitt álit um endurvenjing, fyri síðan at arbeiða víðari við endurmenningini (rehabilitering). Vit eru nú komin nakað ávegis, og væntandi verður álitið handað landsstýrismanninum 1. juni.

Heilsufaklig viðurskiftir á stovnum og sambýlum fyri menningartarnaði

MBF er gjørd varug við, at ein ávís ónøgd er við heilsuliga partin, ið fer fram á stovnum og sambýlum fyri menningartarnaði, serliga tá umræður fjølbrekaði og gomul. Í tí sambandi hevur MBF roynt at kanna ymisk viðurskiftir og hevur nú biðið um ein fund við leiðsluna á Nærverkinum fyri at fáa greiði á hesum.

Atkoma

Byggilóggáva

MBF byrjaði fyri 3 árum síðani at arbeiða miðvíst við politiska myndugleikan um at betra atkomu til almennar bygningar við at fáa hetta skipað í lóg. Vit vísti tá á møguleikan at brúka § 4 stk. 4 og § 5 stk. 3 í byggi og býarskipanarlógini, sum heimilar landsstýrismanninum at gera serligar reglur fyri brekað, har atlit verða tikin til atkomu.
Henda umbøn varð ongantíð gingin á møti. Grundgevingin var at ein Landsbyggireglugerð skuldi gerast, sum skuldi innihalda øll atlit samlað harav eisini fyri brekað.
MBF hevur saman við Ráðnum fyri Brekað arbeitt fyri at fáa sett í verk arbeiðið at gera eina Landsbyggireglugerð.
Tað síðsta sum so er hent í málinum er eitt skriv sum Ráðið fyri Brekað saman við MBF, KSF, FKF, Arkitektafelag Føroya, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag skrivaðu undir og sum varð sent landsstýrismonnunum í Vinnumálum og Innlendismálum.

Í MBF mugu vit bara staðfesta, at tað gongur sera seint á økinum, og tískil mugu vit sjálvi gera nakað fyri at fáa bøtt uppá atkomuviðirskiftini við at gera tiltøk, sum kunnu fáa byggiharrar, kommunur og onnur at taka atlit tá bygt verður. Og tað var so spurningurin, hvat kunnu vit gera meðan vit bíða at lóg kemur á økinum.

Leiðbeining tá bygt verður

MBF setti sær fyri at gera eina leiðbeining um atkomu tá bygt verður, og at fáa hesa senda út til øll stød har bygging fer fram.
Jógvan Sofus Vágsheyg átók sær hesa uppgávuna, og evnaði ein Leiðbeining við teimum mest grundleggjandi krøvunum til mát og standardir, sum verða brúkt í okkara grannalondum. Hesa leiðbeining hava vit sent til allir byggimyndugleikar, kommunur og stovnar, og biði um at Leiðbeiningin verður brúkt sum fyrimynd tá bygt verður.
Saman við Hjálpartólamiðstøðini (HTM) arbeiðir Jógvan Sofus í løtuni fyri at bøta um Leiðbeiningina, so hon kann verða útbygd og víðkað, og er hon eitt veruliga hent amboð hjá øllum, sum skulu byggja. At arbeiðið verður gjørt saman við HTM, er tí at so kunnu vit arbeiða so eins sum møguligt við mátum og ráðum. Møguliga kann Leiðbeiningin brúkast í eini komandi Landsbyggireglugerð.

Skráin

Vitjanin hjá MBF har vit kannaðu atkomu fyri rørslutarnað og hoyritarnað í øllum kommunum í Føroyum, endaði við eini útgávu av bóklinginum "SKRÀIN." Í hesum bóklingi eru øll atkomulig stød skrásett, somuleiðis sum at góð ráð og annað er at finna í bóklinginum. Hann er teldutøkur og á heimasíðuni hjá MBF. Hann verður "redigeraður" 2 ferðir árliga, har stød og brek kunnu leggjast afturat.
Góða umtalan hann fekk hevur eisini haft sína ávirkan, tí fólk ringja og spyrja um ráð og fyri at verða skrásett í bóklinginum, so arbeiðið hevur skapt nógvar ringvirkningar á atkomuøkinum.

Byggimál sum heild.

Jógvan Sofus Vágsheyg tekur sær einsamallur av byggiøkinum, tó í samstarvi við formannin. Fleiri byggimál koma til okkum til viðmerkingar, og MBF hevur ikki nógva orku at taka sær av málunum.

Tí er tað sera gott fyri okkum at Jógvan Sofus sum útbúgvin og serkønur á økinum, kann umsita byggimálini.

Byggimál, sum vórðu viðgjørd í 2006 :

1. Klaksvíkar kommuna :
   Barnagarður undir Hálsi
2. Gjáargarður :
   Útbygging av Gjáargarði
3. Tvøroyrar kommuna :
   Næmingaheim á Tangatrøðni
4. Tórshavnar kommuna :
   Býlingshús/mentanarhús á Berjabrekku
5. Neistin :
   Ítrottarhøll við Landavegin í Tórshavn
6. KFUM - skótarnir á Glyvrum
   Hús til skótavirksemi
7. Bygdahús í Dali
   Bræv til Bødvar Poulsen
8. Arni Brattaberg
   Handilsbygningur í Vági
9. Føroya Ríðingafelag
   Høll til Føroya Ríðingafelag

"Demokrati for alla".

Eitt evni vit saman við hinum norðurlondunum hava sett fokus á er "Demokrati for alla". Fyri 2 árum síðani varð ein kanning gjørd av øllum parlamentunum í norðurlondum. Niðurstøðan varð, at ikki stóð ov gott til á Føroya Løgtingi. Ongin telelykkja í Løgtingssalinum, ov vánalig inngongd fyri koyristólar, og ongin møguleiki at brúka talarastólin á okkara høga tingi, um tú vart koyristólsbrúkari.
Somuleiðis varð kannað um tað var møguligt at verða politiskt aktivur í einum flokki. Heldur ikki var okkara støða góð. Gamla Apotek sum er tilhaldsstað hjá politisku flokkunum er út av lagi tá um atkomu ræður.

"Demokrati for alla" kanningin av parlamentunum varð herfyri endurtikin, fyri at kunna síggja um broytingar eru hendar 2 tey seinastu árini. Enn hava vit ikki fingið niðurstøðuna, men vit halda, at lítið og onki er broytt á økinum.

Saman við hinum norðanlondunum gera vit í felag kanningar og átøk í samband við, at fokus er sett á, um fólk við breki hava møguleika at fara á val eins og allir aðrir borgarar.

Ráðið fyri brekað ger í samstarvi við Deltasentrið í Noregi eitt átak, har ætlanin er at valstøð og kommunur verða spurd um teirra støðu, tá fólk við ymiskum breki skulu á val, og ætlanin er at hava fund um vallógina. Tíðin er akkurát tann rætta nú, at skipa fyri tílíkari kanning, av tí at val skal verða um ½ ár. Greinarøðir skulu skrivast um evnið, og ætlandi verða limafeløgini í MBF spurd um akkurát teirra tørv, tá val er. Hetta er eitt mál vit hava sett á skrá í Ráðnum, og sum vit koma at samstarva við Ráðið fyri brekað um.

Í seinasta MBF blaði varð evnið um demokratisku rættindini um møguleikarnar fyri at luttaka á vali tikið upp. Har viðgera vit møguleikan at sleppa at velja, hóast tú ert rørslutarnaður ella blindur. Eisini seta vit ljóskastaran á atkomu til politiska informatión, og um møguleikan at fylgja við í politikki í føroysku miðlunum, eitt nú vit teksting og tulking.

Norðurlendskt samstarv/altjóða samstarv

ST- handikapkonventiónin/sáttmálin

Í desember 2006 samtykti aðalfundurin hjá ST ein mannarættindasáttmála um rættindi hjá fólki við breki. Sáttmálin setir m.a. neyvar reglur um borgarlig og politisk rættindi s.s. rættin til talufrælsi, familjulív og virðing fyri privatlívi og onnur mentanarlig og sosial rættindi s.s. rættin til undirvísing, heilsu og virðilig bústaðarviðurskiftir. Eisini verða reglur, sum hava serligan týdning fyri brekaði, ásettar s.s. rætturin til atkomuligheit, rætturin til frítt at ferðast, rætturin til eitt sjálvstøðugt lív, og rætturin til menning og endurmenning frá tí almenna.

ST- sáttmálin er rættarliga bindandi, men fyri at hann kann verða rættarliga bindandi í einum landi skal sáttmálin ratifiserast t.v.s., at um hann skal gerast galdandi í Føroyum, skal Føroya Løgting góðkenna at tey taka undir við, at sáttmálin skal vera galdandi í Føroyum.

Her liggur nú ein stór uppgáva hjá limafeløgunum og hjá MBF at fylgja væl við, og halda okkum framat fyri at ávirka almennu myndugleikarnar, og annars Føroya fólki sum heild. Hetta hevur MBF tikið til sín og hevur longu skipað fyri ymiskum til gagns fyri ST-sáttmálaarbeiði framyvir.

Í samband við hátíðarhaldið hjá MBF 24. oktober 2006 varð Holger Kallehauge i Føroyum og helt fyrilestur í Norðurlandahúsinum um arbeiðið við ST handikapkonventiónini. Holger Kallehauge ið er fyrrverandi landsrættardómari, er koyristólsbrúkari og hevur verið við í øllum arbeiðinum fyri at fáa ST konventiónina til vega. Í samband við at hann var í Føroyum var MBF við til at bera so í bandi, at hann kom á ein fund við allar landsstýrismennirnar, har hann greiddi frá konventiónini og um hvørji krøv tað setti til føroysku politikararnar, um hon skuldi fáa gildi í Føroyum.

Fyri at menna limafeløgini og MBF at taka ímóti hesi avbjóðingini nú ST konventiónin helst skal fáa gildi í Føroyum skipaði MBF fyri einum temadegi um konventiónina. Tað vóru løgfrøðingarnir Birita og Heðin Poulsen, ið undirvístu. Umleið 40 fólk luttóku.

Nú hevur MBF so sent Løgmanni eitt skriv við áheitan um at seta í gildi ST-sáttmálan um rættindi teirra brekaðu, umframt at heitt verður á hann um at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá Løgmansskrivstovuni, avvarðandi málaráðum og MBF at fyrireika og kanna, hvørjar lóggávur skulu broytast ella setast í gildi, fyri at ein sáttmálin kann góðkennast í Føroyum.

Í seinasta MBF blaðnum er ein drúgv og góð grein skriva um ST-sáttmálan.

Norðurlendskir fundir

MBF er við í norðurlendskum samstarvi, í NHR (Nordisk Handicappolitiske Råd) og HNR (Handicappedes Nordiske Råd).

Í HNR sita formenninir og aðalskrivararnir fyri paraplyorganisatiónirnar í norðurlondum og sjálvstýrandi økjunum, og harvið umboða Leila Solmunde og Anna Suffía Durhuus Føroyar. HNR arbeiðir út frá felagsáhugamálum. Ein stórur vinningur fyri okkum í Føroyum er at í slíkum felagsskapum hava vit møguleika at síggja handicappolitikk út frá einum nógv breiðari og samansettum sjónarvinkli enn í vanliga gerandisdegi.

NHR umboðar eisini tey 5 norðanlondini, umframt tey 3 sjálvstýrandi økini. Tey 5 norðanlondini hava hvør síni 3 umboð, 1 umboðandi handicaporganisatiónirnar, 1 umboðandi politiska myndugleikan og 1 umboðandi embætisstættina. Føroyar hava bert 1 politiskt valt umboð, sum í løtuni er Leila Solmunde. Í farna árið reisti Leila spurningin um at fáa betri umboðan í NHR á jøvnum føti við hini norðurlondini. Hetta eydnaðist ikki, men ymsar mannagongdir eru broyttar soleiðis at aðalráðini verða boðin við sum eygleiðarar tá bólkurin umboðandi embætisstættina eru saman til fundar.

Annars hevur árið verði merkt av, at ST sáttmálin var á veg og síðan varð samtyktur, og hevur tað tí verið høgt raðfest í báðum Ráðunum.

Samstarv við Ísland

ØBI í Íslandi hevur vent sær til MBF um at fáa eitt tættari samstarv við MBF. Serliga ynskja tey at samstarva við MBF um skipanina av MBF sum felagsskapi. Harumframt ynskja tey eitt tættari samstarv við okkara arbeiði í samband við ST-sáttmálan

Fyriskipanarlig viðurskiftir

Limastøðan.

Tað eru nú 22 limafeløg í MBF. Limatalið tilsamans í limafeløgunum, undir MBF, er nú umleið 6500. Hjartafelagið hevur søkt um limaskap í MBF, og verður hendan umsókn viðgjørd á aðalfundinum í dag.

Starvsnevndin.
Starvsnevndin hevur um hendi dagligu umsitingina av MBF. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánaðin, tó undantikið juli mánaða. Síðani seinasta aðalfund hava 10 starvsnevndarfundir verið hildnir. Fundarfrágreiðingar frá starvsnevndarfundunum hava verið lagdir út á heimasíðuni hjá MBF, men hevur hendan skipan ikki virkað seinastu tíðina. Vónandi kemur henda skipan í lag aftur nú vit fáa nýggja heimasíðu.

Síðani aðalfundin í 2005 hava hesi sitið í starvsnevndini:

Leila Solmunde, formaður
Hendrik Jacobsen, formaður í Sclerosefelagnum, umboðandi Rørslubólkin, næstformaður
Kristianna Rein, formaður í Diabetesfelagnum, umboðandi Medisinska bólkin
Lea Wolles, formaður í LFA, umboðandi Sálarliga/ neurologiska bólkin, nevndarlimur
Jógvan Sofus Vágsheyg, nevndarlimur í Heilafelagnum, umboðandi Samskiftisbólkin.

Varaumboð hava verið: Tórunn Sundberg, Majgunn Erlandsdóttir Nolsøe og Sigrun Mohr. Onki varaumboð hevur verið fyri samskiftisbólkin seinasta árið

Skrivstovan

Leila Solmunde hevur verið formaður í Meginfelag teirra brekaðu seinastu 3 árini. Á skrivstovuni arbeiða Anna Suffía Durhuus, ið er dagligur leiðari, og Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk. Kirstin Vilhelmsen arbeiðir sum reingerðarfólk 7 tímar um vikuna.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá umsiting av m.a. Serflutningsskipanini og avlamisskeltum til hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, frá nógvum fundarvirksemi við onnur feløg, stovnar og politiskar myndugleikar til fyrireiking og stuðul í samband við kanningararbeiði og mangt, mangt annað.

Nógv fólk venda sær eisini til MBF við fyrispurningum av ymsum slag. Men so vítt gjørligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini at limafeløgini oftast eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

Lógararbeiði.

MBF fær regluliga lógir til ummælis, og í einstøkum førum eru vit eisini við í fyrireikandi arbeiðinum til lógarsmíð. Tað skal tó viðmerkjast, at í farna valskeiði hava ikki verið so nógvar lógir sum undanfarin ár til ummælis. Í farna ári hava vit m.a. havt hesar lógir til ummælis: Arbeiðsskaðatryggingarlógin, forsorgarlógina § 18 stk. 4 og stk. 5 um íbúðarbroyting og um stuðul til bilkeyp, forsorgarlógin § 32 b. um rættin av varðveita stuðulin aftaná fylta 67. ár, og spurningar viðvíkjandi lægstu fyritíðarpensión.

At vera við til at gera viðmerkingar til lógarsmíð krevur nógva orku. Vit hava skipað tað soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, ið MBF fær til ummælis, eisini verða sendar út til viðkomandi limafeløg, so tey kunnu gera sínar viðmerkingar. Í einstøkum førum fáa vit serkøna hjálp frá løgfrøðingi. Ein afturvendandi trupulleiki er, at tíðarfreistirnar oftast eru alt ov stuttar. Hetta hava vit gjørt vart við upp til fleiri ferðir, uttan at tað hevur hjálpt.

Livikorskanningin.

Granskingardepilin fyri økismenning í Klaksvík hevur nú í nøkur ár arbeitt við at kanna livikorini hjá fyritíðarpensionistum. Olga Biskopstø hevur staðið fyri kanningini, men MBF hevur eisini havt ein virknan leiklut m.a. at skaffa fólk at vera við í kanningini og nú at gjøgnumlesa og gera viðmerkingar áðrenn kanningin verður almannakunngjørd. Onnur, ið gjøgnumlesa kanningina áðrenn hon verður almannakunngjørd eru Kristianna Winther Poulsen, Hallbera West og Tórunn Guttesen.

Fundir o.a.

Formansfundir. Formansfundirnir er eitt fakligt forum har formennirnir í limafeløgunum hittast fyri sínámillum kunning, ið kann vera við til at styrkja samstarvið millum feløgini og fyri at fakliga støði mennist. Í farna ári hava 2 formansfundir verið. Á fyrra fundinum greiddi Olga Biskopstø frá um gongdina og fyribils úrslitið av livikorskanningini. Á seinra fundinum greiddi Kristianna Rein

frá einum skeiði, hon hevði verið á, um marknaðarføring og í tí sambandi um, hvussu vit sum feløg kunnu marknaðarføra okkum.

Skeið. Sum fyrr nevnt skipaði MBF fyri skeiði um ST-sáttmalan, ið varð samtyktur í desember 2006. Skeiðið varð hildið á Sjómansskúlanum, har umleið 40 fólk luttóku. Løgfrøðingarnir Birita og Heðin Poulsen undirvístu á degnum. Tilfar latið í samband við dagin fæst við at venda sær til skrivstovuna.

Regluligir fundir við Almannastjóran. MBF hevur regluliga fundir við Almannastjóran. Á fundunum verða ymisk aktuell mál av almennum áhuga viðgjørd, umframt at ein sínámillum kunning fer fram. Seinasta árið havt vit havt 5 fundir. Mál, ið hava verið á skánni hava m.a. verið viðvíkjandi: stuðlum í skúlunum, nýggju dagstovnalógini, fjølbrekað og sernámsdepilin, bygnaðarbroytingar á almannastovuni, rúmligi arbeiðsmarknaðurin o.m.a.

Undirvísing. MBF verður ofta biðið um at hava framløgur, serliga er tað formaðurin, ið verður biðin. Í farna ári hevur formaðurin verið úti og havt fyrilestrar á Ráðstevnuni hjá Nærverkinum, á Heilsuskúlanum og Pensionistafelagnum Fløvin.

MBF blaðið.

Seinasta árið eru 2 bløð útkomin. Tað er Rit&Rák við Torfinn Smith sum skrivar flestu greinarnar og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið. Upplagið er uppá 1500 eintøk.

Heimasíðan.

MBF hevur havt eina heimasíðu í nøkur ár, men heimasíðan er nú vorðin ótíðarhóskandi, so tí hevur starvsnevndin avgjørt at MBF skal fáa eina nýggja heimasíðu. Vit hava gjørt avtalu við Sansir um at gera eina nýggja heimasíðu, og verður hon helst klár um nakrar mánaðir.

Tænastur.

MBF umsitur Serflutningsskipan Landssins. Endamálið við skipanini er at veita hjálp til fólki, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól. Skipanin umfatar Tórshavn, Klaksvík, Vestmanna kommunu umframt allar kommunurnar í Eysturoyar og Sunda kommunu. Tilgongdin til skipanina er alsamt vaksandi. Higartil hevur MBF visiterað til skipanina. Men ætlanin er, at kommurnar sjálvar skulu átaka sær hesa uppgávu, men enn er tað bara Tórshavnar kommuna sum reelt hevur yvirtikið hesa uppgávu.

MBF umsitur eisini tillutanina av handikapskeltum.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað
Formaðurin í MBF er føddur limur í RfB. Sum varalimur fyri hana situr Anna Suffía Durhuus. Uni Rasmussen er valt umboð fyri MBF og Óli Wolles er valdur sum varaumboð. Barbara á Tjaldrafløtti

er formaður í Ráðnum, aftaná at Sólja í Ólavstovu, fyrrverandi formaður varð sett sum Løgtingsins Umboðsmaður.

Happadráttargrunnurin.

3 limir sita í Happadráttargrunninum og eru teir: Leila Solmunde, formaður í MBF er føddur limur í grunninum, Doris Hansen umboðar MBF og Eyðun Mohr Hansen umboðar AHR. Sum varalimir sita Randfríð Sørensen, formaður í Epileptikarafelagnum og Kristianna Rein, formaður í Diabetesfelagnum.

"Ljóðbøkur":

Margretha Næss hevur sitið sum MBF umboð í hesi nevnd í nógv ár. Endamálið hjá Ljóðbókum er at skipa fyri ljóðbókaútgávu á føroyskum máli til blind og lesitarnað fólk í øllum aldri. Í ljóðbókanevndini sita umframt Margreta Næss, Karin Kass fyri Blindastovnin, Durita Joensen fyri Landsbókasavnið, Malan Hilmarsdóttir fyri Býarbókasavnið, Solveig Debess fyri Landsmiðstøðina og Tórunn Sumberg fyri Blindafelagið.

Margreta Næss er samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkurnar.

"Ljóðbøkur" hevur eina heimasíðu www.ljodbokur.fo, har ein sær hvørjar ljóðbøkur eru komnar út.

Ráðið fyri ferðslutrygd:

Herit Joensen, Vestmanna hevur sitið sum MBF umboð í hesum ráð í nógv ár.

FUR:

MBF eigur 2 umboð í FUR, men av tí at tað ikki hevur eydnast okkum at fáa báðar sessirnar settar, er tað bert Jákup Danielsen úr Nýrafelagnum, ið hevur umboðað MBF Vit fara tí við hesum at heita á limafeløg, ið hava ungdom við í sínum felag, um at finna ungfólk, í mesta lagi 30 ár, ið vilja átaka sær at sita sum MBF - umboð í FUR.

Teknmálstulkatænastan.

Formaðurin í MBF er føddur kassameistari í Teknmálstulkatænastuni, men hevur í løtuni latið henda sess til Annu Suffíu Durhuus, dagligur leiðari í MBF.

Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskiftinum millum teknmáksbrúkarar og hoyrandi.

Serflutningsskipanin.

MBF hevur umboðan í stýrinum fyri skipanini við Annu Suffíu Durhuus, dagl. leiðari í MBF. Umframt hana situr 1 umboð fyri KSF, 1 fyri FK og 1 umboð fyri AHR.

Sjúklingaráðið.

Tey 3 Sjúkrahúsráðini eru nú umskipaði til 1 Sjúklingaráð fyri allar Føroyar. MBF hevur ikki beinleiðis umboðan í Sjúklingaráðnum, men limir úr limafeløgunum í MBF hava møguleika at gerast limir í ráðnum. Í løtuni sita umboð frá Giktafelagnum, Sinnisbata, Diabetesfelagnum og Javna í ráðnum.

Sambært lógini er uppgávan hjá sjúklingaráðnum at vera ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar. Ætlanin er, at ráðið skal geva landsstýrismanninum eitt breiðari avgerðargrundarlag, við at ráðgevinigin kann vera øðrvísi enn tann, hann fær frá fakpersónum í heilsuverkinum.